**SKEMMAN** | søkir handilslærling



# Gerst handilslærlingur hjá okkum og fá nógvar góðar fyrimunir

**Vit bjóða:**
- Møguleika fyri altjóða útbúgving
- Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
- Møguleika fyri arbeiði við stórum avbjóðingum - bæði í Føroyum og á eini av deildunum í útlandinum
- Løn sambært galdandi sáttmála hjá S&K

**Vit vænta at tú ert:**
Samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi, arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining.

**Kunning um Skemmuna:**
Í Skemmuni starvast 14 fólk. Eisini hevur Skemman deildir í hesum londum: Íslandi, Kanada, Letlandi, Litava og Estlandi. Í hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 20 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 1000 arbeiðspláss tilsamans á øllum deildunum í teimum 7 londunum.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram í Danmark. Gjøgnum samstarvið við Jysk fáa okkara lærlingar loyvi at koma á Jysk skúlan í Norður-Jútlandi, og tí fáa teir ein nógv størri fakligan kunnleika um okkara vørur, enn ein fær gjøgnum eina vanliga handilsútbúgving. Skúlin er góðkendur av almennu myndugleikunum.

**Krøv:**
Fyri at gerast lærlingur í Skemmuni krevst FHS-útbúgving ella onnur miðnámsútbúgving.

Lærlingurin skal byrja 1. oktober.

Hevur hetta tín áhuga, send so eina skrivliga umsókn innan 1. september til:

**SKEMMAN**
Staravegur 7 · Postboks 3278 · 110 Tórshavn

ella á teldupost: skemman@skemman.fo

Meira fæst at vita um læruplássið við at ringja 315588 og spyrja eftir Dan.

pétur & pétur • 320870

Staravegur 7 · Tórshavn
Tel 315588 · Fax 310709

**SKEMMAN**






Shell søkir eftir nýggjum leiðara til tær báðar Shell-støðirnar í Havn - við Norðara Ringveg og á Frælsinum.
Leiðarin hevur fulla ábyrgd av dagligu leiðsluni og rakstrinum av Shell-støðunum
Talan er um eitt avbjóðandi, ábyrgdarfult og sjálvstøðugt starv, har tann rætti persónurin hevur góðar møguleikar at seta sín egna dám á tær báðar støðirnar í samstarvi við leiðsluna hjá Føroya Shell.

**Vit ynskja ein persón, sum er royndur innan handil og annars hevur hesar eginleikar:**

- ✔ Leiðslusinnaður
- ✔ Ágrýtin
- ✔ Tænastusinnaður
- ✔ Fleksibul
- ✔ Samstarvssinnaður
- ✔ Álítandi
- ✔ Jaligur og opin
- ✔ Røkin

Løn sambært avtalu

Áhugað kunnu venda sær til Erling í Liða, sølu- og marknaðarleiðara, á telefon 347400 ella fartelefon 216899.

Umsóknirnar verða viðgjørdar í trúnaði og skulu í seinasta lagi mánadagin 21. august 2006 sendast til

Føroya Shell
Viðarnes
100 Tórshavn
att.: Erling í Liða

www.shell.fo

SISERO 351800



**Runavíkar kommuna**



Vilt tú stjóra havnunum í Runavíkar kommunu ?

*Runavíkar Havn er eitt spennandi og fjølbroytt arbeiðspláss. Árliga vitja uml. 1.600 skip og bátar havnirnar í Runavíkar Kommunu. Havnin er soleiðis ein týðandi tænastudepil fyri sjóvinnuna. Seinnu árini hava ferðamannaskip eisini vitjað Runavíkar Havn, og hetta økið ynskja vit eisini at menna framyvir.*

*Til at leiða og menna havnina víðari, sum ein tænstudepil fyri skip, bátar og aðrar brúkarar, verður søkt eftir*

## Havnarstjóra
*Til Runavíkar Havn*

Havnarstjórin er umsitingar- og rakstrarleiðari, og hevur ábyrgd fyri at stýra virkseminum hjá Runavíkar havn innan galdandi karmar og reglur. Havnarstjórin skal vísa ágrýtni í arbeiðinum við at menna havnirnar í Runavíkar kommunu til at lúka krøv og ynskir, ið brúkarar, myndugleikar og aðrir aktørar hava.

Arbeiðsuppgávurnar, sum viðkomandi kemur at røkja, eru í høvuðsheitum hesar:

**Av ymisku arbeiðsuppgávunum kunnu nevnast:**
- * Leiða, samskipa og effektivisera virksemi innan politiskar og búskaparligar karmar.
- * Motivera hini starvsfólkini, og skapa samvilja um mál og amboð.
- * Syrgja fyri yvirordnaðari planlegging, figgjarstýring, og virksemismetingum annars.
- * Skipa tænastuvirksemið mótvegis verandi og framtíðar brúkarum av havnunum.
- * Samstarva við avvarðandi myndugleikar.

**Ynskiligir førleikar:**
- * Hollar leiðsluførleikar frá almennari ella privatari vinnu.
- * Innlit í figgjarlig viðurskiftir.
- * Góðan kunnleika til avbjóðingar og ynskir hjá sjóvinnuni.
- * Góðar málsligar førleikar, serliga á enskum, bæði í skrift og talu.
- * Dugir væl at orða seg, bæði munnligt og skrivligt.
- * Teldukunnleika og kunnleika til nýmótans leiðsluamboð.
- * Viðkomandi royndir innan sjóvinnu.
- * Hægri viðkomandi útbúgving.

**Persónligir eginleikar:**
Sum persónur vænta vit, at tú ert neyvur, ágrýtin og miðvísur, tær dámar væl stórar avbjóðingar og tú hevur lætt við at samskifta og samstarva. Víðari vænta vit, at tú hevur eitt mennandi lyndi, ert fleksibul og kanst arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, tá tað krevst. Tú trívist við at arbeiða ímóti freistum og hevur evnir til at hava ein jaligan hugburð bæði innan- og uttanhýsis.

Løn og setanartreytir annars verða sambært avtalu við arbeiðsgevara.

**Umsóknin:**
Umsóknir verða at senda skjótast gjørligt og í seinasta lagi hósdagin **07. September 2006** til: Runavíkar kommunu, Heiðavegur 26, 600 Saltangará, tlf. 417000. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til borgarstjóran.

www.runavik.fo



Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo



# FØRARI TIL BETONGPUMPUBIL

Søkt verður eftir raskum manni at koyra betongpumpubil.
Arbeiðið er sjálvstøðugt og koyrt verður av blandistøðini á hjalla.
Tann, ið settur verður kemur at hava ábyrgdina av betongbilinum og skal vera røkin.
Byrjast kann beinanvegin ella eftir nærri avtalu.

J&K

P/F J & K Petersen · Tel 31 50 60 / Fax 58 50 01
e-mail JKP@JKP.FO

Sosialurin 341800